# HF til Estland

FIMLEIKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Hjá gentunum var Havnar Fimleikafelag eisini stóri vinnarin. Tær vóru einasta felagið, ið luttók bæði við einum a- og einum b-liði, og tær fingu ikki minni enn gull og bronsu. FM-heitið hjá gentunum gevur eisini atgongd til HM kappingina, sum verður longu um tríggjar vikur

Inga Thorkildshøj hevur verið venjari hjá gentunum í nógv ár, og hevur fylgt teimum líka frá smágentualdrinum. Hon hevur verið til kapping í Danmark við teimum tvær ferðir fyrr, og báðu ferð vóru tær langt fremstar.

Men í ár valdi Fimleikasambandið at royna nakað nýtt, og í staðin fyri at senda genturnar til Danmarkar, har støði á fimleikinum er lægri enn í Føroyum, sleppa genturnar í ár við til HM. Hetta varð kunngjørt fyri stuttari tíð síðani. Og um tríggjar vikur skulu genturnar avstað.

## Broyta seriuna

– Vit kunnu ikki fara avstað við seriuni, sum vit nýttu til FM, tí krøvini til HM eru strangari. So vit noyðast at nýta hesa vikuna til at broyta seriuna, soleiðis, at hon lýkur altjóða krøvini, og so mugu vit taka tvær tær næstu vikurnar at venja hana í, greiðir Inga frá.

Hon sigur, at hetta er fyrsta árið, at eitt tílíkt HM í juniordeildunum verður roynt, og tí er ilt at vita hvat man skal vænta sær.

– Vit vita einki um ungu liðini í hinum londunum. Men við at hyggja at seniorliðunum, kunnu vit ganga út frá, at støði er ótrúliga høgt. Men eingin veit sum sagt nakað um støðið hjá teimum yngru, og tí taka vit fyrst og fremst hendan túrin sum eina uppliving, sigur Inga.

Hon sigur at genturnar eru øgiliga spentar og gleða seg at sleppa avstað. Men áðrenn tær sleppa so langt, liggur nógv venjing fyri framman.

– Vit fara at taka teir eyka venjingartímarnar sum vit fáa, tí vit hava ikki serliga langa tíð at læra broyttu seriuna. Hon má gerast torførari, og onkrar samansetingar mugu eisini broytast, fyri at hon skal lúka krøvini, sigur Inga Thorkildshøj at enda.

**Gentur, samanlagt**

| | | | |
|---|---|---|---|
| HF a | nr | 1 | 33,47 |
| Støkk | nr | 2 | 32 |
| HFb | nr | 3 | 31,54 |
| Ljósið | nr | 4 | 30,6 |

Tað verður HFa, sum Fimleikasambandið sendir at luttaka í HM kappingini í estetic fimleiki, sum verður í Estonia 17 mars. Trý tey bestu liðini kunnu fara við, men nr 2 og nr 3 mugu rinda kostnaðin sjálvi.

## Pinkur

Hjá pinkunum var tað Ljósið sum streyk avstað við gullinum. Tað má eisini sigast at vera eitt satt bragd, tí tær vóru einasta liðið, sum megnaði at vinna á Havnar Fimleikafelag, sum annars vann alt hitt.

Pinkurnar, sum eru 9-12 ára gamlar, kappast bert í eini seriu, nevniliga tí fríu.

Tær eru eisini einasti bólkur, sum ikki sleppur uttanlands at kappast.

**Pinkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ljósið | nr | 1 | 15,9 stig |
| HF | nr | 2 | 15,86 |
| Støkk | Nr | 3 | 15,7 |
| Flog | nr | 4 | 14,2 |











STARVSLÝSING

Hjálparfólk

**Søkt verður eftir hjálparfólki til starvsfólkadeildina at byrja beinanvegin. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um innan- og uttanhýsis ørindi, avloysing í móttøkuni við telefon, posti og annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni. Arbeiðstíðin er í løtuni frá kl. 08.00-16.00.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir ungum fólki við students-, HF- ella HH-prógvi, og sum ætlar sær at fara undir víðari útbúgving í 2006.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda

Landsverki
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 7. mars 2005. Merkið brævbjálvan ”Umsókn eftir hjálparfólki”. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311 333 frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land